**Nr.**

**Løgtingslóg**

**um**

**broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**
(Lestrarstuðul frádrigin í fyritíðarpensjón)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 2020, verður aftan á § 19, men áðrenn yvirskriftina yvir § 20, sett:

"**§ 19 a.** Hjá persóni, sum móttekur fyritíðarpensjón, og samstundis móttekur lestrarstuðul sambært lógini um lestrarstuðul § 6, stk. 2, nr. 1, nr. 3, nr. 6, nr. 7 og nr. 9, verður lestrarstuðulin drigin frá grundupphæddini.

*Stk. 2.* Er lestrarstuðulin hægri enn grundupphæddin, verður upphæddin, sum er hægri enn grundupphæddin drigin frá í avlamisviðbótini. Fyri lægstu fyritíðarpensjonistar verður drigið frá í eyka viðbótini."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2021.

Samtykt á Løgtingi hin 10. desember 2020 við 18-0-11 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 10. desember 2020

stjóri

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

LM-033/2020